# ÚTLAND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 3418xx

STUTT SAGT

## Norðurírar fáa kravboð

Stjórnirnar í London og Dublin ávara nú teir norðurírsku politikararnar: Semjast tit ikki, fáa tit ongan stuðul frá okkum.

Teir báðir forsætisráðharrarnir, Tony Blair og Bertie Ahern, komu til Belfast í gjár at tingast við politikararnar har. Teir báðir boðaðu fyrr í ár frá, at teir eru til reiðar at virka fyri einari endaligari semju í Norðurírlandi, men at norðurírar fáa freist til tann 24. november. Megna teir ikki at skipa eina felags politiska umsiting til ta tíð, gevast teir báðir við sínum stuðuli.

Politiskir eygleiðarar í Norðurírlandi hava ikki góðar vónir um eina loysn. Teir vænta ikki, at tann 80 ára gamli protestantiski leiðarin Ian Paisley fer at samstarva við katólska flokkin Sinn Fein. Tvørturímóti hevur hann fleiri ferðir sagt, at eitt tílíkt samstarv kemur ikki upp á tal.

Verandi friðartætlan fyri Norðurírland er frá 1998. Hon sigur millum annað, at protestantar og katolikkar skulu skipa felags politiska umsiting, men enn er vápnahvíld tað einasta, sum er komið burturúr.

## Tingast við ETA um frið

Í Spania sigur stjórnin seg nú vera til reiðar at fara undir friðarsamráðingar við baskiska loysingarfelagsskapin ETA.

Jose Luis Rodriguez Zapatero, forsætisráðharri, sigur, at samráðingarnar hava til endamáls at gera enda á tí drúgva og blóðuga baskiska stríðnum ímóti myndugleikunum, men hann ivast ikki, at samráðingarnar verða bæði torførar og drúgvar. Zapatero vil ikki siga, nær samráðingarnar við baskar byrja, og tí verður neyvan nakað at frætta fyrr enn í september, tá innanríkisráðharrin skal geva tjóðartinginum eina frágreiðing um málið, skrivar AP úr Madrid.

Teir konservativu flokkarnir eru ikki fegnir um avgerðina hjá stjórnini at tosa við baskararnar. Teir halda, at stjórnin viðurkennir yvirgangsmenn, nú hon játtar at samráðast við ETA og Batasuna, sum er tann politiski vongurin hjá baskisku loysingarmonnunum.

## Bókhandlarin stevnir

Afghanski bókhandlarin Shah Mohammad Rais hevur nú lagt sak ímóti norsku tíðindakvinnuni og rithøvundinum Åsne Sejerstad, ið skrivaði ta heimskendu bókina „Bókhandlarin í Kabul".

Shah Mohammad Rais vil vera við, at bókin sigur nógv annað enn sannleikan um bókhandlaran og húski hansara, og at hann kann ikki kenna seg tryggan í Afghanistan longur. Tí hevur hann nú lagt sak við endurgjaldskravi ímóti rithøvundinum og forlagnum Cappelen, ið gav bókina út.

Åsne Sejerstad hevur forvunnið nógvar milliónir krónur burtur úr bókini um bókhandlaran í Kabul, men sakførarin hjá bókhandlaranum avsannar, at málið bara snýr seg um pengar, nú bókhandlarin krevur endurgjald.

## Urtapottar við rúsevni

Løgreglan í Niðurlondum hevur tikið níggju fólk, sum eru skuldsett fyri at hava roynt at smugla 320 kilo av kokaini inn í landið.

Tollararnir í Rotterdam komu fram á kokaini, tá teir kannaðu stórar urtapottar, sum komu við skipi úr Costa Rica. Tað vísti seg, at kokainið lá fjalt niðri undir moldini í pottunum. Tollararnir og løgreglan samdust um at lata rúsevnið liggja í pottunum, men tá teir vórðu lætnir móttakarunum, herjaði løgreglan á, og níggju fólk vórðu tikin.

Niðurlendska løgreglan sigur, at smuglararnir høvdu fingið einar 120 milliónir krónur fyri rúsevnið.

# Palestinar fáa bara tóm orð

**Palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, bønar umheimin um hjálp, men heimsins leiðarar aftra seg við at finnast at Ísrael**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur mælt ísraelsku stjórnini til at vísa varsemi, men heimsfelagsskapurin aftrar seg við at finnast at Ísrael, nú landið hevur søkt at Gaza og sett fleiri ráðharrar og tinglimir í varðhald. Ein frágreiðing er kanska, at sambært embætismonnum er ST farið undir loyniligar samráðingar við báðar partar fyri at fáa eina loysn á kreppuni.

Palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, hevur biðið altjóða samfelagið leggja uppí. Talsmaður hansara, Nabil Abu Rudeima, segði í gjár, at forsetin fordømir ísraelska álopið, og at fleiri ráðharrar og tinglimir eru tiknir, og at hann vil hava ta sokallaðu Miðeystur-kvartettina og altjóða samfelagið at taka neyðug stig alt fyri eitt.

Men ST, ES, USA og Russland, sum mynda kvartettina, eru varin við at finnast at Ísrael. Amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, sigur, at eitt ávíst afturhaldni hevði kanska fingið friðartilgongdina aftur á beina kós, men at palestinar mugu eisini gevast við sínum álopum.



*Í nátt bumbaðu ísraelsmenn palestinska innanríkisráðið, sum skjótt stóð í ljósum loga*

– Hendan kreppan vísir, hvussu neyðugt tað er, at allir partar, allir palestinskir partar, arbeiða saman fyri at fáa enda á yvirganginum, legði hon afturat.

Norska stjórnin hevur fordømt ísraelsku innrásina í Gaza.

– Vit kunnu á ongan hátt góðtaka eitt tílíkt átak, tí ísraelska svarið er alt ov umfatandi samanborið við orsøkina til innrásina, segði Jens Stoltenberg, forsætisráðharri, í gjár. Hann legði afturat, at ísraelsku álopini á samferðslukervið í Gaza er brot á fólkarættin, og at tað er álvarssamt.

# Vindorku ístaðin fyri kjarnorku

**Sviar ætla at seta stórar vindmyllur upp á sjónum**

ORKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Svenska stjórnin hevur góðkent eina ætlan hjá orkufelagnum Vattenfall at seta nógvar stórar vindmyllur upp á sjónum suður úr býnum Trelleborg har suðuri í landinum.

TT skrivar, at talan er um 128 vindmyllur, og at tær seinastu skulu setast upp í 2008 á Krigers-bankanum sunnan fyri Trelleborg.

Verkætlanin er mett at kosta millum 10 og 12 milliardir krónur, og vindmyllurnar skulu framleiða tveir terrawatt-tímar um árið. Tað er nóg mikið til 440.000 húsarhald og svarar til helmingin av elorkuni, sum 2. reaktorur á Barsebæck-verkinum framleiddi, til hann bleiv stongdur fyri einum ári síðani.

Fyritøkan Sweden Offshore Wind AB, sum Vattenfall eigur, skal standa fyri verkætlanini, men áðrenn arbeiðið fer í gongd, skulu myndugleikarnir kanna, hvørja ávirkan vindmyllurnar kunnu fáa á fugl og fisk og umhvørvið á Krigers-bankanum annars, skrivar TT.